


*Johannes Tauser, sum starvast hjá Tidy Car*

# Tidy Car - sum at fáa ein nýggjan bil

**Eftir ein harðan føroyskan vetur, eru nógvir bilar skitnir, mattir í lakkinum og síggja gamlir út innan. Ein bilur, sum hevur fingið eina Tidy Car viðgerð, bæði uttan og innan, verður sum nýggjur aftur og fær munandi hægri søluvirði.**

TIDY CAR
*Magnus Gunnarsson*

Bilarnir í Føroyum blíva munandi skitnari enn til dømis í Danmark, bæði innan og uttan. Fyri at tryggja tað best møguliga úrslitið, byrja allar Tidy Car viðgerðir við at bilurin verður væl og virðiliga vaskaður. Síðan verða brúktar sergjørdar maskinur, sum reinsa lakk, plastik og krom sera effektivt. Eftir at lakkið er reinsað og bilurin poleraður, verður lakkið serviðgjørt við Tidy Car forsegling, sum verður ein partur av lakkyvirflatuni.

### Luktar sum nýggjur

Á teimum bilum ið verða viðgjørdir innan, er ofta neyðugt at taka setrini úr bilinum og hátrýstreinsa tey. Eftir at setrini, hurðabetrekkini og gólvteppini eru reinsaði, verður alt impregnerað, soleiðis at inntrekkið tolir meira av, og bilurin luktar sum nýggjur innan, hóast hann luktaði av mjólk ella fiski áðrenn hann kom til viðgerðina.

Ein viðgerð uttan og innan tekur upp til 3 dagar.

### Eftirviðgerð

Innan eitt ár eftir at ein bilur hevur verið til viðgerð, fær kundin bræv frá Tidy Car, við tilboði um at koma til eftirviðgerð við bilinum. Um kundin tekur av hesum tilboði, fær hann bilin reinsaðan og klárgjørdan uttan og innan. Úrslitið verður ein skínandi blankur bilur, sum er mótstøðuførur móti øllum veðri. Hjá Tidy Car eru vanliga 4 ella 5 mans til arbeiðis. Leiðari er Skylv Hartvigsson.



*Bergur Askaham er í ferð við eina Tidy Car viðgerð*



# Toyota Corolla - sum hatchback, stationcar og Verso

**Toyota Corolla er ikki hvør sum helst í bilheiminum. Umframt at teir eru av heimsins mest seldu bilum, eru teir eisini kendir fyri at vera haldgóðir og álítandi. Nýggjasti Corolla fær sera góð ummæli í útlendskum bilmagasinum, og hann hevur longu víst seg at verða ein succes**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Í meira enn 30 ár hevur Corolla verið ein stórseljari í sínum klassa. Onki er at ivast í at konstruktørarnir hava havt tann minna Yaris sum fyrimynd, tá teir hava teknað Corolla. Modellskráin er samansett av hatchback við 3 og 5 hurðum, stationcar og Verso, ið hevur øðrvísi design og er góðar 10 cm hægri enn hinir. Corolla sedan verður gjørdur í Turkalandi, men óvist er nær hann kemur hendanvegin




*Her er Ronny í Lon, sølumaður hjá Reyni Servive, við nýggjasta Corolla*

### VVTi motorar

Tær vanligu útgávurnar hava 1,4 litur motor við 97 hk ella 1.6 litur við 110 hk, umframt T Sport sum fæst við 192 hk. Allir motorarnir hava tað framkomnu VVTi tøknina, og eru sera orkusparandi Dieselmotorurin er ein 2.0 litur commonrail við 90 hk. Eins og fleiri aðrir nýggir bilar hava allar útgávurnar elektriska servostýring. Koyrieginleikarnir eru so góðir, sum man kann ynskja sær í einum nútímans bili.

### Stationcar og Verso

Stationvognurin, ið er góðar 20 cm longri enn hatchback, er ein rúmligur bilur við góðum plássi til viðføri. Við tað at aksilfrástøðan er størri enn á forgangarunum, er meira pláss til tey ferðandi á baksetrinum. Umframt Yaris Verso og Avensis Verso hevur Corolla nú eisini ein Verso. Verso skilir seg út frá hinum Corolla modellunum í nógvar mátar. Hann er bygdur í MPV stíli, við høgum taki og er sera rúmligur og barnavinarligur innan.

### Smart design

Nógv er gjørt burturúr at halda kvalitetin á bilinum á so høgum støði sum gjørligt. Hetta merkist serliga innan, har til dømis tilfarið í instrumentborðinum er bleytari, og lítið er brúkt av hørðum plastikki. Allar útgávurnar hava originalt radio sum standard. Designið er smart og alt er gjørt fyri at tekkjast evropeisku keyparunum, sum eisini hava tikið væl ímóti nýggja Corolla.




*Corolla stationcar, ið er longri enn hatchback og Verso, hevur stórt viðførisrúm og gott pláss til viðførið*

## Toyota Corolla 1.6 Hatchback 5/h

Motorurin: 1.6 litur VVTi 16V 110 hk

| | |
|---|---|
| 0-100 km/t | 10,2 sek |
| Bensinnýtsla | 14,3 km/l |
| Dekkstødd | 195/60-15 |
| Stødd og vekt: | |
| Longd | 418 cm |
| Breidd | 171 cm |
| Hædd | 148 cm |
| Eginvekt | 1175 kg |
| Totalvekt | 1650 kg |
| Prísur: | 177.600 |

Søluumboð:
P/F Reyni Sevice
Vegurin Langi
FO-188 Hoyvík
Tel.313040
www.reyniservice.fo